## DAGSINS MEINING

# Økt kapping - gagnar sethúsaeigarunum

Kappingin at fíggja bústaðir økist. Fyri stuttum kom Suðuroyar Sparikassi við einum nýggjum tilboði, DJ-lán, sum er fallið í góða jørð. Hóast hinir fíggingarstovnarnir einki søgdu tá, var væntandi, at teir komu við onkrum tilboði til sethúsaeigararnar. Nú komu so Bankin og Føroya Sparikassi kropp á kroppi við Skáaláni og real-kredittláni.

Vit kunnu ikki siga annað, enn at hugburðurin hjá fígging-arstovnunum er nógv broyttur tey seinastu árini. Bara fyri fáum árum síðani føldu viðskiftafólk seg nærmast sum biddarar, tá tey við húgvuni í hondini skuldu inn til stjóran um "aller nådigst" at biða um eitt lán, tí við-komandi ætlaði at seta føtur undir egið borð.

Treytirnar vóru eisini út av lagi vánaligar. Fleiri veðrættir. Í minst trimum fíggingarstovnum. Og við væl hægri rentu enn neyðugt. Skuldi onkur skái ella onkur sersømd fáast, so skuldi viðkomandi vigast og kannast. Ofta skuldu foreldur ella onnur veita trygd. Men mangur fór avstað aftur uttan at fáa ta tænastu, viðkomandi ynskti at fáa.

Í grundini var tað ólukksáliga býtt. Tí til eina og hvørja tíð er tann, sum lænir og rindar rentu, sum er fyritreytin fyri øllum fíggingarvirksemi. Tað er lænarin, sum er grundarlagið undir fíggjarheiminum, men hann var tann veiki, tann eyðmýkti, men nú tað er so stór kapping um lænarar og lán, er tað lænarin, sum er tann sterki og nærmast kann seta treytirnar.

Langt um leingi ásannaðu fíggingarstovnarnir sína vitjan-artíð. Teir eru blivnir meira tænastuminded. Onki er at ivast í, at kappingin um viðskiftafólkini ger, at rentan verður á einum lágum stigi, og lánshættirnir nógvir. Bara spell, at Húsalánsgrunnurin ikki hevur fingið betri heimildir frá landsstýrinum.

Tað er einki at ivast í, at hann í stóran mun hevur verið medvirkandi til, at rentustigið er so lágt sum tað er. Somuleiðis ásannaði hann fyri mongum árum síðani, at best var um afturgjaldingartíðin var longi, so tær hart-kroystu barnafamiljurnar høvdu tað eitt sindur lættari tey fyrstu árini, tá tey eisini skuldu byggja sær hús o.s.fr.

Hetta ásnnar m.a. Sparikassin nú við tíðindaskrivi hós-morgunin. Fólk skulu hava tað lættari. Ikki minst tey fyrstu árini, tá børnini koma og vaksa til. Fólk liva longri. Hava støðugari inntøku. Hetta eru nakarar av grundgevingunum og fólk hava tí ikki fyri neyðini at gjalda lánini niður eftir nøkrum fáum árum, sum annars hevur verið vanligt.

Vit skulu ikki siga góðan morgun øksaskaft, men ynska bæði skáalánum og nýggju relakrdittlánunum vælkomnum við vón um, at tað verður lættari hjá set-húsaeigarum. Eisini lættari og betri hjá familjum í bygdum, har inntøkan ikki er støðug og so høg sum í stórplássunum, tí tað eru ofta tey, fiskafólkið, sum virkar útflutningsvøruna, grundarlagið undir búskapinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samhaldsfastur stuttleiki

**Helgi Abrahamsen**



Skulu vit flenna, ella skulu vit gráta, tá vit hugsa um tað sum er hent á pensjóns-økinum?

Seinasta mikudag viðgjørdi løgtingið eitt uppskot um arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnin. Uppskotið er liður í ætlanunum hjá samgonguni um at endurnýggja pensjóns-skipanina í Føroyum, og ikki var sørt, at tingmenn kapp-aðust um at geva sær sjálvum og egnum flokki æruna fyri øll framstig, sum eru hend á pensjónsøkinum tey seinastu nógvu árini.

**Helmsdal valdi at flenna**

Undir viðgerðini gjørdi Finn-ur Helmsdal úr Tjóðveld-isflokkinum gjøldur burtur úr einum uppskoti sum Edmund Joensen, vegna Sambandsflokkin, legði fyri tingið í august 2001. Edmund Joensen skeyt tá upp at játta 400 mió. krónur til Samhaldsfasta í 2001 og aftur 400 mió. krónur í 2002, og hetta helt Finnur Helmsdal vera sera stuttligt.

Men tað sum Finnur gloymdi at siga (og sum er ein týðandi partur av mál-inum), er, at uppskotið hjá Sambandsflokkinum varð lagt fram í august 2001, með-an táverandi samgonguflokk-ar arbeiddu við at skerja ríkisveitingina. Uppskotið var ein roynd at steðga ætlan-ini hjá samgonguflokkunum. Uppskotsstillarin hevði eina lítla vón um, at onkur sam-gongutingmaður møguliga fór at vakna, tá hann sá, at pengarnir vóru betur farnir sum ein eyka stuðul til tey gomlu, heldur enn at tveita teir út av vindeyganum. Men vit mugu tíverri ásanna, at táverandi meiriluti á Føroya Løgtingi helt tað tæna land-inum betur, at pengarnir vórðu tveittir burtur, heldur enn at lata tey gomlu fáa teir.

Hetta er tann kaldi veru-leikin, og tí kennist tað løgið, at somu politikarar og teirra partamenn nú eru so harmir um, at bæði landskassin og tey gomlu mangla pengar. H vat annað høvdu teir vænt-að?

Ì viðmerkingunum til upp-skot Sambandsfloksins frá 2001 stóð: »Hetta uppskotið er sett fram sum eitt alterna-tiv til uppskotið frá samgong-uni um at minka og taka burtur blokkstuðulin«. Hesa detaljuna eigur Finnur Helms-dal ikki at gloyma, næstu ferð hann stuttleikar sær við at vísa til uppskotið.

**Syrgiligur stuttleiki**

Sjálvsagt eru tvær ferðir 400 mió. kórnur nógvir pengar at geva teimum gomlu. Men um vit samanbera hetta við tað, sum fullveldissamgongan valdi at tveita burtur, so er í tí førinum talan um dupult so nógvar pengar (higartil) og í tí førinum fingu hvørki ung ella gomul nakað fyri pengarnar.

So meðan onkur heldur søg-una um tær 800 milliónirnar, sum pensjónistarnir ikki fingu, vera stuttliga, so haldi eg hina søguna um ta dupultu upphæddina, sum fór út av vindeyganum, vera syrgiliga.

# Til minnis um minningarhaldið - sum ongantíð var

**Hildibjørt Gulklett**

1. november er friðaður teirra sjólátnu til minnis.

Teir spurdu so tráliga í Útvarpi Føroya, hví teir sigldu undir krígnum? - ein ikki sera gløggur spurning-ur!

Tað vóru ringar tíðir, og lítið og einki at forvinna. Teir sum sigldu, vistu fullvæl, at tað var eingin stuttleikaferð, teir fóru.

Fyri at markera 60 ára krígslok, kundi Sjónvarp Før-oya til minnis havt samrøður við teir, sum sigldu - tað er hóast alt onkur, sum hórar undan enn. Teir hava eina ørgrynnu av vitan at oysa av, so tað uppvaksandi ættar-liðið, sum nú er, kundi fingið ein hóma av at ímynda sær, hvussu trupult alt var. Men so eiðasørt, at Sjónvarp Før-oya læt við seg koma - tað kennist sera hugstoytt!

At enda vil eg siga stóra tøkk til FF fyri teirra fjøl-táttaða lesnað, tað fløvar!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.